ÚT AT KOYRA

# Kongabrúgvin í 50’unum og 60’unum

**Nú Tryggingarfelagið Føroyar ger stórar umbyggingar á Kongabrúnni, eru hesar myndirnar frá 50 og 60´unum sera áhugaverdar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Húsini niðast við á myndini eru frá vinstru: handilin hjá Carl á Lag, reyðu húsini eru málingahandilin hjá Poul í Geil, niðan ímillum neystið við plakatunum á, er ein partur av Hotel Føroyum. Í gula húsinum eru Niels L. Arge ursmiðjur og tubbakshandilin hjá Oscar Arge, trappan við Nótaneystið, er niðan til Hotel Føroyar sum brendi í 1950. Síðan kemur Hotel Føroyar, og húsið har Heimavirkið var. Hotel Føroyar var í trimum bygningum, áðrenn tað mittasta brendi. Við Nótaneystið stendur ein bilur, sum kundi verið ein Opel, og við Hotel Føroyar er ein Morris við last*

*Myndaeigari: Birgar Johannessen*



*Hendan myndin er av sama stað, fyrst í 60´unum. Leggið til merkis at trappan inn á Tryggingarsambandið Føroyar og Hotel Føroyar er á sama stað, sum á ovaru myndini. Á fyrsta húsinum til vinstru, stendur nú P/F Jákup Johansen & Co. Bilarnir eru frá vinstru, ein Rambler Classic stationvognur frá 1961, við eykahjólinum á takinum, síðan koma tveir bilar hjá Jón Hansen, ein VW Transporter við last og galesju, og ein Bedford lastbilur. Uttasti bilurin til høgru er DKW bilurin hjá Niels L.Arge.*

*Myndaeigari: Birgar Johannessen*



ÚT AT KOYRA

# Talið á motorakførum veksur alsamt

**Á nýggjastu hagtølunum hjá Bileftirlitinum sæst at talið á person og vørubilum er vaksandi. Vit merkja tað øll á ferðsluni, sum er vaksin sera nógv síðan búskaparkreppuna fyrra partin av 90´unum.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Eins og samfelagið er nógv broytt hesi seinastu 50 árini, eru rættuliga stórar broytingar farnar fram innan samferðsluna, og ferðsluna sum heild. Tá í tíðini vóru ikki nógvir bilar í landinum, og um vit samanbera við í dag, so vóru so gott sum allir bilarnir arbeiðsbilar av onkrum slag, vørubilar, lastbilar, hýruvognar og nakrir fáir privatbilar. Tað var ikki vanligt at keypa nýggjan privatbil, og vóru teir flestu tí keyptir brúktir. Í 1948 vóru umleið 600 motorakfør í landinum, harav var ein rættuliga stórur partur motorsúkklur.

### Valutaloyvini avtikin

Bilatalið í Føroyum tók rættuliga dik á seg síðst í sekstiárunum, tá ikki varð neyðugt at hava valutaloyvi fyri at keypa sær ein privatbil. Um vit fara 30 ár aftur í tíðina, so vóru í 1971 seldir tilsamans 941 bilar í Føroyum, har bilmerkini Mazda, Ford og Toyota lágu á odda. Sambært bóklinginum "Ferðslan 1999" hjá Landsfrøðinginum vóru tilsamans 2.019 nýggj motorakfør seld hetta árið, og vóru tilsamans 18.818 motorakfør í landinum tann 1.januar 2000.

**Hagtøk fyri skráseting av nýggjum akførum fyri jan.-aug. í 2000 og 2001.**

| Akfaraslag | jan.-aug. 2000 | jan.-aug. 2001 | broyting 00-2001 | %broyting 00-2001 |
|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 1 | 0 | -1 | -100,00% |
| Bussar | 3 | 2 | -1 | -33,33% |
| Hýrubilar | 10 | 13 | 3 | 30,00% |
| Lastbilar | 14 | 11 | -3 | -21,43% |
| Leguvognar | 2 | 3 | 1 | 50,00% |
| Motorsúkkla | 5 | 5 | 0 | 0,00% |
| Líkvognar | 2 | 0 | -2 | -100,00% |
| Neyðsendakfar | 3 | 2 | -1 | -33,33% |
| Persónbilar | 896 | 1046 | 150 | 16,74% |
| Smábussar | 7 | 11 | 4 | 57,14% |
| Tangabilar | 1 | 0 | -1 | -100,00% |
| Viðfestivognar | 37 | 67 | 30 | 81,08% |
| Vøruvognar | 198 | 219 | 21 | 1061% |
| Samlað | 1179 | 1379 | 200 | 16,96% |




NISSAN ALMERA
Árg 99, Km 30.000. bíliga til sølu.
*317947*



**MERCEDES BENZ 300 TD 155 HK TURBO DIESEL**
Árg 89, Km 260.000. Kr. 129.000.



**RENAULT MEGANE 1.6**
Árg okt.97, Km 46.000. Píkadekk á felgum fylgja við. Kr. 119.000.



**MERCEDES VITO VØRUBILUR 2.0 TURBO DIESEL**
Árg jun.98, Km 64.000. Píkadekk á felgum fylgja við. Kr. 152.000.



**RENAULT MEGANE 1.9 TURBO DIESEL**
Árg mai.98, Km 30.000. sportfelgur, tokulyktir o.a..
Kr. 127.000.



**TOYOTA CARINA XLI SEDAN**
Árg mai.95, Km 93.000. sera væl hildin, og í góðum standi.
Kr. 105.000.

VOLVO RENAULT
VR BILAR

**Hoyvíksvegur**
**tel 322110**

# Politistur

**Eitt arbeiði við avbjóðingum**

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgarunum.*

**Eitt arbeiði allan sólarringin**

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøka politistarnar og politistøðirnar.



Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at rokka felags málum. Sum politistur ert tú altið ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

**Løn og útbúgving**

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið– fast starv sum politistur.

**Menning og karriera**

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



**Ynskir tú at vera við?**

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella livsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelaganum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga lítsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 14 48 Fax 31 82 66
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. Tveir politistar skulu setast 1/4-2002.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 1/10-2001